# **Frágreiðing um verkætlan nr. 200700673**

Endamálið við hesi verkætlan er at gera eitt kongafiskatrol, ið verður léttari at toga, við minni lemmum, so oljunýtslan verður minni enn við teimum trolum, ið nú verða nýtt. Flestu skip, ið fiska kongafisk við flótitroli, brúka útlendsk trol. Tey eru sera stór og rúgvusmikil, og nógv orka og stórir lemmar mugu brúkast til tess at fáa tey at skvera (spíla út). Eisini eru tey sera kostnaðarmikil, tí at tilfarið, ið verður brúkt til meskarnar, er av dýrum slag.

Vónin vil gera eitt kongafiskatrol, ið verður lætt at toga og handfara, og haraftrat er umráðandi at halda kostnaðin niðri.

Fyri Vónina byrjaði verkætlanin í mai 2004, har vit koyrdu eitt 2048m trol umborð á Skálaberg. Hetta var eitt vanligt svartkjaftatrol við 32 metur meskum í fornetinum, har bellurin var broyttur til ein kongafiskabell. Svartkjaftabellarnir hava nógv av 80mm meska í afturpartinum, har kongafiskabellarnir hava 160mm. Kongafiskabellurin bleiv sostatt væl longri enn svartkjaftabellurin.



*Skálaberg*

Á túrinum gjørdi Skálaberg bert 2 tóv við okkara troli. Staðfest varð, at trolið kundi brúkast, men tað var ikki optimalt. Eitt nú var blæan, ið verður brúkt í undirnetinum, fyri at kongafiskurin ikki skal kava niður ígjøgnum, ov rúgvusmikil. Trolið varð tikið í land, og tilfarið í blæuni varð skift út við nógv smekkrari tilfar. Trolið fór umborð aftur á Skálaberg, men var ongantíð í sjónum.



*Enniberg*

Síðani fingu vit møguleikan at royna trolið umborð á Enniberg, ið fiskaði í Irmingarhavinum. Við á túrinum var umboð fyri Vónina at eygleiða, hvussu trolið fiskaði. Staðfest varð, at trolið var ov tungt til Enniberg. Her skula vit hava í huganum, at Enniberg hevur 4.800 hp, meðan Skálaberg hevur 11.000 hp. Sambært okkara manni og skiparanum á Enniberg var bellurin sum hann skuldi, men fornetið kundi havt størri meskar og tilfarið smekkrari, um skip ið høvdu millum 3.000 hp og 5.000 hp skuldu fáa optimalt burtur úr trolinum. Trolið rúgvaði eisini nógv upp á netatrumluni á skipinum, og tað er helst meskastøddin í fornetinum, ið elvir til tað. Fornetið í útlendsku trolunum hevur sum oftast 64 metur meskar ella størri.

Eftir hetta gjørdu vit av at gera nýtt fornet við størri meskum. Her skal greiðast frá, hvussu trolið er gjørt. Stóra frávikið við hesum trolinum í mun til hini er tilfarið, ið verður brúkt til fornetið. Útlendsku fornetini verða framleidd úr sonevndum sjálvspreiðandi tilfari, ið er rættiliga stívt og kann ikki spleysast. Tí er neyðugt at gera knútar á, tá trolini skulu umvælast. Tilfarið, ið fornetið frá Vónini er gjørt úr, er flættað og sera lætt at spleysa.



*Red Lion í royndarbrunninum hjá Sintef í Hirtshals*

Fremsti parturin av trolinum – fornetið – er gjørdur úr flættaðum nylon, ið eisini verður brúkt til onnur flótitrol, m.a. svartkjaftatrol. Tilfarið er sterkt og vælegnað til trol, ið skulu spolast uppá netatrumlu hetta tí, at nylon hevur tann eginleika, at tað toygnar rættiliga nógv. Stórstu meskarnir í fornetinum eru 64 metrar. Hetta verður so hálverað so hvørt sum meskastøddin minkar, tvs. 64, 32, 16, 8 og so víðari. 64, 32, 16 og 8 metur-meskarnir eru spleysaðir saman við hond soleiðis, at teir ikki skeiklast. Frá 4 metur-meskunum (ella 4000mm) og heilt aftur verður knútanet brúkt. Aftur til 200mm meskarnar er alt úr nylon. Síðani koma seks sektiónir av 200mm og tvær av 160mm, ið eru gjørdar úr Dyneema-neti, ið bert hevur 1,5mm tráð. Aftaná tær er ein sektión av 160mm í 3,5mm Premium Plus tráði og ein av 160mm í 4,5mm Premium Plus tráði. Aftast koma so tríggjar sektiónir av 160mm í 2x6mm (dupultur tráður) Polyethylene tráði, harav tvær eru lagdar í T90. Tað vil siga, at upptøkurnar venda út móti leysinum.

Høvuðlínan og síðulínurnar á trolinum eru úr avíkavist 20mm og 18mm Dyneema-togi. Fiskilínan er úr 19mm og 16mm mid link ketu, ið er klødd við polyesterkappa. Leyslínurnar eru úr sokallaðum Euroflex togi, ið arbeiðir væl saman við nylonnetinum.



*Nakað av fiski stóð í netinum afturi í bellinum*

Vit fingu síðani Fagraberg at royna trolið. Nótaskipini lógu orsaka av, at svartkjaftaveiðan var liðug. Fagraberg tók trolið við, og setti kós norður á 73 stig, har onnur skip vóru farin at royna eftir kongafiski. Umboð frá Vónini var við á túrinum. Hini skipini á feltinum vóru Skálaberg, Enniberg, og Ran. Allir høvdu áðurnevndu útlendsku trolini, Skálaberg 4100mtr, Enniberg 3590mtr og Ran 2048mtr.



*Tað komu nakrir slíkir posar upp*

Trolið fiskaði væl samanborið við hini, tá man hugsar um støddina av trolinum. Niðanfyri er dømi uppá fiskiskap í eitt samdøgur.

Nevndu nøgdir av kongafiski eru í rundum fiski:
Ran fekk 20 tons í 24 tímar
Skálaberg fekk 50 tons í 25 tímar
Enniberg fekk 30 tons í 24 tímar
Fagraberg fekk 30 tons í 23 tímar



*Stóri kongafiskur (Sebastes Marinus)*

Hesar royndir vístu, at trolið fiskar væl, og stendur ikki aftanfyri tey, ið longu verða brúkt. Tað frægasta úrslitið higartil var júst hesar báðar túrarnar við Fagraberg norðanfyri.

Vit hava ikki megnað at gjørt eina endaliga niðurstøðu um verkætlanina. Orsøkin til tað er í høvuðsheitum, at tað er sera trupult at fáa skip at royna trolið. Hetta við at fiska kongafisk norðanfyri vardi bara í tvey ár, so fiskiskapurin gongur í høvuðsheitum fyri seg í Irmingarhavinum, og kvotan er ikki býtt út til skipini, so tað er tann, ið sterkastur er, ið fær mest burturúr. Tá sigur tað seg sjálvt, at tað er trupult at fáa skip at gera royndir við einum nýggjum troli. Fleiri skip hava havt trolið við sum eyka trol, men onkuntíð hevur tað als ikki verið í sjónum á túrinum. Í øðrum førum hava teir sligið okkara trol undir, tá lítið og onki av fiski hevur verið at sæð, so tá ber illa til at fáa eina eftirfarandi samanbering.


*Enn ein mestsum fullur posi*

Trolið er á goymslu hjá okkum í løtuni, og vit vilja sjálvandi royna tað vit kunnu, fyri at fáa tað út við onkrum skipið tá høvið býðst. Sum tað sær út nú, so verður tað ikki fyrr enn á vári 2011. Vit hava staðfest, at trolið fiskar nøktandi, er lætt at arbeiða við og hevur lágan prís í mun til tey, ið verða brúkt. Tað verður óivað okkurt sum kann gerast enn betri, men sum heild kann sigast, at vit eru á rættari leið.

Tá vit einaferð veruliga fáa eitt skip at brúka trolið eina heila sesong, verður grundarlag fyri at gera eina endaliga niðurstøðu, um hetta er rætta trolið til kongafisk.

P/F VÓNIN

Jógvan S. Jacobsen